# Ein góður kava-ruddari er gull verdur

**JÓLAHEILSAN** William McKay hevur grivið kava til Gjáar og har á leiðini í samfull 30 ár. Nøgvir ringir kavadagar hava verið hesi árini, og eins og í 1980 er McKay altíð uppá fartin



**TØKK**

*Tað eru kanska ikki mong sum siga tað við kavaruddararnar hjá Landsverki. Men fólkið við Gjógv ynskti at siga Willian McKay tøkk fyri trúfast arbeiði at halda veg teirra opnan fyri ferðslu um veturin Mynd: landverk.fo*



Góði William!

Vit her norðuri vilja vit hesum takka tær fyri tað stóra arbeiðið, ið tú so trúfast hevur røkt.
Ein góður kavaruddari er gull verdur. Vit ynskja tær eina bjarta framtíð og mong góð ár aftrat.
Gleðilig jól. Jógvan, Páll, Óli, Nicolina, Oddrør, Jóhan, Sofus, Hans Edvard, Kristian Jákup, Erling, Jacobina, Ebba, Ásta Maria, Ólavur J, Ebba, Esther, Maren K.

**GULL VERDUR**

*– Vit her norðuri vilja bara takka tær fyri stóra arbeiðið, ið tú so trúfastur hevur røkt. Ein góður kavaruddari er gull verdur, verður víst á í brævinum*

## »Meðan onnur liggja heitt undir dýnuni kl. 05 um morgunin, eru McKay og aðrir kavagravarar hjá Landsverki longu úti í kuldanum og grava kava«

Tá tey fra Landsverki ringdu til McKay'in ein morgunin í farnu viku, var hann á veg á Gjáarvegin.

Her skuldi hann hyggja, hvussu har sá út, nú bæði kavi og nógvur vindur gjørdu um seg. Hóast hetta einsliga, krevjandi og ofta enntá vandamikla starv, er lagið gott á Williami.

Henda morgunin visti hann eisini eina gleðiliga jólasøgu at siga frá:

### Heilsan

Tað var mánadagin í farnu viku, at boðað var til hugnakvøld við Gjógv.

Fyriskiparararnir ringdu til William og bjóðaðu honum við, men lá tað ikki fyri at luttaka.

Tá ið McKay morgunin eftir er til arbeiðis við brúnna um Streymin, steðgar ein bilur í nánd av honum.

Ein dama, berandi eina stóra jólakurv við øllum góðum í, kemur úr bilinum. Kurvin er til William McKay, sum verður púra bilsin og ikki minst rørdur. Í kurvini var eisini ein jólaheilsan til kavaruddaran:

*"Vit her norðuri vilja bara takka tær fyri stóra arbeiðið, ið tú so trúfastur hevur røkt. Ein góður kavaruddari er gull verdur. Vit ynskja tær eina bjarta framtíð og mong góð ár aftrat. Gleðilig jól."*

Meðan onnur liggja heitt undir dýnuni kl. 05 um morgunin, eru McKay og aðrir kavagravarar hjá Landsverki longu úti í kuldanum og grava kava. Og teir gera sítt arbeiðið væl.

Tað vita fólk flest, og tað vita millum onnur eisini tey, ið hava borið Williami McKay hesa hugnaligu jólaheilsan.

snorri@sosialurin.fo

